# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hensar Ellingsgaard, fyrrverandi landsskúlastjóri, Tórshavn**, andaðist sunnudagin, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hensar, kunnu lata KFUM-skótunum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Leivur Hammer, Hov**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 23. januar, 84 ára gamal.

**Aska Maria Jensen, ættað úr Skúgvi**, andaðist mánadagin á Tjarnagarði. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum í Havn fríggjadagin kl. 13. Tey, sum ynskja at senda blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina gávu til Sclerosufelagið.

## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Mánadagin 25. jan. fylti Jóna Borg Dahl, í vági, 60 ár. Dagurin verður hildin í Billardhúsinum leygardagin 30. jan. frá kl. 13 til 17, har øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 28. jan. fyllir Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta. 9, millum kl. 16 og 20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 31. jan. fyllir Anna Louisa Jacobsen í Skálafirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 29. jan. hava Ingibjørg og Olfert Debes á Oyri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familju, leygardagin 30. jan.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 30. jan. hava hjúnini Anny og Pole Klein, Vestmanna, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin millum kl. 11 og 15 til morgunmat í kaffistovuni inni á Fjørð.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 31. jan. hava hjúnuni Sonja og Hans Olaf Andersen í Lopra gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Diamantbrúdleyp**
Hósdagin 28. jan. hava Frida og Andrew Thomsen í Porkeri diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. februar. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. februar.

# Kristina útlærdur tænari

Kristina Tavsen Rummelhoff hevur lokið tænaraútbúgving sína við rósi á tekniska skúlanum í Aalborg.

Kristina byrjaði á Hotel Hafnia sum praktikantur, og gjørdist hon beinanvegin partur av matstovuni.

Tænastusinni hennara vakti stóran ans hjá leiðsluni, og eftir hálvum ári sum avloysari kom hon í læru 7. august 2006. Lærutíðin er trý ár og fýra mánaðir, og bleiv hon útlærd 6. desember 2009.

Kristina er sera dugnalig og ein ábyrgdarfullur samstarvsfelagi. Serliga hava vit verið takksom fyri hennara fleksibilitet í tí dagligu arbeiðsgongdini. Nú Kristina er farin at lesa til erhvervsøkonom, og seinni serviceøkonom, vilja vit nýta høvi at ynskja henni alt tað besta í framtíð hennara, verður sagt frá leiðsluni á Hotel Hafnia.



*Kristina Tavsen Rummelhoff saman við lærumeistara sínum Christionnu Samuelsen*

# Námsfrøðingar í Esbjerg



*Fríggjadagin fingu tríggir føroyingar prógv sum námsfrøðingar frá Esbjerg Seminarium. Tey eru frá vinstru Magdalena Joensen úr Fuglafirði, Ragnar A. Thomassen úr Miðvági og Valgerð Larsen úr Norðragøtu.*

## Dagurin

**27. januar. Chrysostomos,** deyður ár 407. Jóannes æt hann, men fekk navnið Chrysostomos (gullsmiður), av tí at hann var tiltikin fyri at prædika. Var patriarkur í Konstantinopel, men fekk so nógvar fíggindar innan fyri kirkjuliðið, at hann fleiri ferðir mátti taka til rímingar, og á einari av ferðunum doyði hann, men varð seinni skírdur halgimenni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*